# ítróttur

Nr. 226 • hósdagur • 24. november 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Shevchenko koyrir á Milan

**Manchester United er í stórum trupulleikum og í Milan munnu tey prísa seg lukkuliga um, at tey hava besta áleyparan í Europa á liðnum**

CHAMPIONS LEAGUE
*Jákup Mørk*

Næst seinasta umfarið í bólkaspælinum í europeisku meistarakappingini varð spælt týs- og mikukvøldið. Í fleiri bólkum hevur oddastøðan nú teknað seg heilt sjónliga, men onkra staðni er spenningurin tó framvegis stórur.

### United í trupulleikum

Ikki minst er talan um spenta støðu í bólki D. Har varð annars roknað við, at Manchester United skuldi vinna seg trygt víðari, meðan Villareal, Lille og Benfica máttu stríðast um annað plássið.

Men enska stórfelagið er í løtuni á triða plássinum, og teir verða nú noyddir at fáa í minsta lagi ein javnleik - og helst ein sigur - í seinasta útidystinum móti Benfica, um teir skulu vinna seg víðari. Týskvøldið hevði United vitjan av Villarreal, men enn einaferð máttu heimaáskoðararnir sanna, at talan gjørdist um vónbrot í 0-0 dysti. Benfica og Lille spældu somuleiðis javnleik. Støðan í bólkinum er nú, at Villarreal hevur 7 stig.. Lille og Man U hava 6 stig, men franska liðið hevur betri innanhýsis roknskap. Og við 5 stigum er langt í frá víst, at leikluturin hjá Benfica er av.

### Sheva bjargaði Milan

Eitt annað stórfelag, sum hevur verið í trupulleikum, er italska AC Milan,. Teir høvdu mikukvøldið truplan útidyst móti Fenerbache, og her gjørdist talan um satt Sheva-Show. Ukrainski Andrey Shevchenko skeyt nevnliga øll fýra málini, sum góvu Milan eitt gott útgangsstøði undan seinasta dystinum. Men enn hava bæði PSV og Schalke møguleika at órógva oddaliðið. Schalke vann annars tryggan sigur á PSV, tá liðini spældu mikukvøldið. Støðan í bólki E er nú, at Milan hevur 8 stig. Tað sama hevur Schalke, meðan PSV Eindhoven hevur 7 stig.

### Favorittarnir

Í hinum bólkunum tykist talan vera um støður, har stóru favorittarnir longu hava tryggjað sær víðari luttøku.

Bayern München og Juventsu eru víðari í bólki A, eins og Arsenal og Ajax eru tað í bólki B.



*Andrey Shevchenko var í hopla, tá hann við fýra málum mest sum einsamallur sendi Milan í oddin á bólki E*

*Mynd: Reuters*

Í bólki C er Barcelona væl og virðiliga komið víðari, og so er spurningurin, hvørt Udinese, Panathinaikos ella Werder Bremen skulu taka næsta plássið.

Í bólki F er Lyon heldur óvæntað trygt á odda, eftir at teir megnaðu javnleik á útivølli móti Real Madred. Men kongaliga spanska felagið hevur tó eisini tryggjað sær víðari luttøku.

Liverpool og Chelsea eru bæði vís í í víðari luttøku í bólki G, meðan Inter somuleiðis hevur vissað sær víðari atgongd í bólki H. Har er tó framveigs hørd kapping um næsta plássið, og stendur kappingin her millum Rangers, Petrzalka og Porto.

## Inter hevði ongan italienara á liðnum

Italska felagið Inter Milan hevði ongan italienara í byrjunaruppstillingini í dystinum ímóti Artmedia Bratislava

Inter vann annars 4-0 við trimum málum frá Adriano, ið er úr Brasilia. Hitt málið skoraði Luis Figo, ið var einasti evropearin á liðnum hjá Inter.

Inter tryggjaði sær við hesum sigrinum eitt pláss í finalunum eftir ársskiftið.

Í hinum dystinum leiktu FC Port og Rangers javnt 1-1, og tað hevur við sær, at Rangers framvegis heldur fast um annaðplássið undan seinasta dystinum í bólkinum.

---

## Ferguson bjartskygdur

Hóast United skal vinna seinasta dystin fyri at koma víðari, hevur Sir Alex Ferguson góðar vónir

Manchester United hevur bert fingið seks stig eftir fimm dystir í bólkaspælinum, og tí stendur nógv á liðnum undan seinasta dystinum á útivølli ímóti Benfica - ein dystur, ið United allarhelst skal vinna.

Hóast útlitini ikki eru eins góð, og tey plaga at vera, er Ferguson bjartskygdur.

- Vit hava megnað tað fleiri ferðir áður. Eg haldi, at venjingarstøðan er góð, og tí eru vit bjartskygdir undan seinasta dystinum. Sjálvsálitið er í øllum førum til staðar, segði Alex Ferguson eftir dystin ímóti Villareal.

- Eg haldi, at vit høvdu uppiborið at vinna í kvøld. Hetta var ikki nakað vánaligt avrik, men vit høvdu bara ikki hepnið við okkum frammanfyri málinum, legði Ferguson afturat.

**Flogbóltsstøður**

Meistaradeild, kvinnur

| | d | v | - | t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 6 | 6 | - | 0 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 2 SÍ | 6 | 5 | - | 1 | 17 | 7 | 10 | 10 |
| 3 TB | 5 | 2 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 4 |
| 4 Mjølnir | 6 | 2 | - | 4 | 8 | 15 | -7 | 4 |
| 5 ÍF | 5 | 1 | - | 4 | 7 | 14 | -7 | 2 |
| 6 KÍF | 6 | 1 | - | 5 | 7 | 16 | -9 | 2 |

Meistaradeild, menn

| | d | v | - | t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fleyr | 5 | 5 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| 2 SÍ | 4 | 3 | - | 1 | 11 | 5 | 6 | 6 |
| 3 Mjølnir | 5 | 2 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 4 |
| 4 ÍF | 5 | 2 | - | 3 | 10 | 11 | -1 | 4 |
| 5 Nøvan | 5 | 0 | - | 5 | 0 | 15 | -15 | 0 |

# SÍ fylgir oddinum

SÍ fekk harða mótstøðu, tá tær í gjár vitjaðu hjá Mjølnir. Sørvágskvinnurnar hava annars havt eitt sera gott kappingarár higartil, har tær sum tær einastu hava givið oyggjarfeløgunum á Giljanesi kapping.

Og tað eydnaðist eisini SÍ at vinna dystin í Klaksvík í gjár, men tað var ikki bara sum at siga tað. Mjølnir legði nevnliga bragdliga fyri, og tær tóku sær eisini av fyrsta settinum. Men SÍ helt á at trýsta, og tað gav eisini úrslit. Tey trý næstu settini vórðu øll vunnin, og so kundu gestirnir fegnast, tá tær aftur løgdu leiðina um Leirvíksfjørð.

Í mansdeildini var ein dystur á skránni, tá Mjølnir vitjaði hjá higartil stiga- og settleysa Nøvuni. Heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað hjá Sundalagsmonnum at fáa stig burtur úr dystinum, sum endaði við trimum tryggum settum til gestirnar.

**-mørk**

**Úrslit**

**Meistaradeild kvinnur**
Mjølnir-SÍ 1-3 (25-22, 20-25, 15-25, 16-25)

**Meistaradeild menn**
Nøvan-Mjølnir 0-3 (17-25, 9-25, 14-25)